

*Tjaldur fekk av at vita, tá tær um vikuskiftið spældu tveir dystir á rað móti teimum báðum oddaliðunum í deildini*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Tjaldur-VB 14-58 og Tjaldur-Stjørnan 10-56

# Tvífalt skrædl í Runavík

Tað var ikki hissini umgang, ið neyðars kvinnurnar hjá Tjaldur fingu um vikuskiftið. Tey bæði fremstu liðini í Sunset-kappingini hava bæði tvey vitjað í Runavík í vikuskiftinum, og manningin hjá Tjaldur er bukað bæði reyð, gul og blá.

Fríggjakvøldið var tað oddaliðið VB, ið var á vitjan, og tá gjørdist talan um ein lemjandi 14-58 ósigur. Tveir dagar seinni vóru steypavinnararnir úr Stjørnuni og vitjaðu, og enn einaferð var talan um eitt satt skrædl. Kvinnurnar úr Klaksvík vunnu nevnliga stórt, 56-10, so ikki kann sigast annað, enn at Tjaldur um vikuskiftið av álvara fekk at merkja, hvussu stórur munurin er á toppi og botni í Sunset-kappingini.

Vit hava tíverri ikki fingið nakrar dómaraseðlar sendandi úr Runavík, og tí ber ikki til hjá okkum at gera nakað hagtalsyvirlit fyri dystirnar báðar.

# ÍF Føroyar við kvinnuliði

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Felagið hjá føroyskum útisetum í Keypmannahavn kundi markera ein serligan dag sunnudagin. Hetta var nevniliga fyrstu ferð í 66 ára søgu felagsins, at eitt kvinnulið hevur umboðað ÍF Føroyar í kappingini hjá KBU (Københavns Boldspil Union).

Liðið spælir í seriu 1, og fyrsti dysturin gekk eisini væl. Kvinnurnar hjá ÍF Føroyum vunnu nevniliga 6-0 ímóti GVI eftir 2-0 í steðginum. Málskjúttar vóru Irdi H. Nónklett (2), Teresa S. Andersen (2), Svanna V. Nielsen og Maria Vang.

Liðið varð mannað við hesum leikarum: Vivian Spange Larsen, Lív Mikkelsen, Paula Sjóstein, Liljan av Fløtum Jespersen, Linda Skorheim, Maria Vang, Silja á Borg Færø, Sunnva Kjærbo, Svanna Vesturdal Nielsen, Irdi H. Nónklett, Teresa S. Andersen. Útskiftarar vóru Súsanna Haraldsen, Gunn S. Müller, Monja Hammer og Aslaug Suðuroy.

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Súni Olsen | GÍ | 3 |
| Atli Danielsen | KÍ | 3 |
| Bogi Gregersen | Skála | 3 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 3 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 2 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 2 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 2 |
| Erling Fles | KÍ | 2 |
| Andy Olsen | NSÍ | 2 |
| Milan Kulic | VB | 2 |

## Formula-deildin

| | d. | v - j -t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 3 | 2 - 1 - 0 | 8 | 6 | 2 | 7 |
| 2 KÍ | 3 | 2 - 1 - 0 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 3 Skála | 3 | 1 - 2 - 0 | 8 | 4 | 4 | 5 |
| 4 NSÍ | 3 | 1 - 1 - 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 5 VB | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 6 EB/Streymur | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 7 B36 | 3 | 1 - 1 - 1 | 1 | 1 | 0 | 4 |
| 8 HB | 3 | 1 - 0 - 2 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 9 TB | 3 | 0 - 2 - 1 | 2 | 6 | -4 | 2 |
| 10 GÍ | 3 | 0 - 0 - 3 | 5 | 8 | -3 | 0 |

## Sunset-kappingin

KVINNUR

| | d. | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 11 | 11 - 0 - 0 | 837 | 482 | 355 | 35 |
| 2 Stjørnan | 11 | 10 - 0 - 1 | 743 | 470 | 273 | 33 |
| 3 Neistin | 13 | 10 - 0 - 3 | 776 | 563 | 213 | 30 |
| 4 Søljan | 12 | 6 - 0 - 6 | 694 | 605 | 89 | 20 |
| 5 VÍF | 11 | 4 - 0 - 7 | 568 | 591 | -23 | 13 |
| 6 StÍF | 11 | 2 - 0 - 9 | 543 | 672 | -129 | 9 |
| 7 Kyndil | 12 | 3 - 0 - 9 | 501 | 708 | -207 | 9 |
| 8 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 351 | 922 | -571 | 0 |